**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI**
**MATR. NR. 999a VIÐ HVANNASUNDSGØTU, TÓRSHAVN**

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali 1, matr. nr. 999a við Hvannasundsgøtu í Tórshavn og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

## §2. FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa bústaðarbygging á økinum.

Stk. 2. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er uml. 2700 $m^2$ til støddar, og liggur í einum A1 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini kann brúkast til bústaðir.

Stk. 3. Útstykkingin hevur felags tún og felags parkeringspláss.

Stk. 4. Vegir og felags tún skulu gerast samsvarandi kortskjali 2.

Stk. 5. Sambært kap. IV, §5, stk. 9 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett, at í serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrliga avmarkað øki kann verða loyvt at byggja íbúðir.

Stk. 6. Fyri viðurskifti, sum ikki eru regulerað í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3 NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Økið skal nýtast til bústaðir og felags hentleikar til íbúgvarnar.

## §4 VEGIR

Stk. 1. Vegir skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu

## §5 GØTUR, FRÍØKIR OG FELAGS PARKERINGSØKIR

Stk. 1. Kortskjal 2 vísir, hvar felags tún og felags parkeringsøkir skulu staðsetast.

Stk. 2. 24 p-pláss verða á felags parkeringsøki.

Stk. 3. Gøtur og fríøki sum er lagt av til spælipláss skulu planerast og hava fasta álegging.

## §6 BYGGING, STØDD OG STAÐSETING

Stk. 1. Byggjast skulu 16 íbúðir og tilhoyrandi skúrðar.

Stk. 2. Mest loyvda hædd á íbúðarbygningi er 6,5 m til hægsta punkt við útvegg í lægru síðuni og 7,5 m til hægsta punkt við útvegg í hægru síðuni.

Stk. 3. Ásetingar viðvíkjandi bygging skulu verða í samsvari við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

## §7 ÚTSJÓND HÚSANNA

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifulltrúan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §8 VERANDI BYGGING

Stk. 1. Henda byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi lóglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við lógligari nýtslu av eini ogn.

Stk. 2. Ikki er loyvt at vaksa um hús við at byggja um, ella at taka tey til aðra nýtslu ímóti reglunum í byggisamtyktini.

## §9 BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggimyndugleikin og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §10 UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.




| | |
|---|---|
| **Tórshavnar Kommuna** **Býarskipanardeildin** | |
| **Heiti** | Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri Hvannasundsgøtu matr. nr. 999a, Tórshavn |
| **Undirheiti** | Kort 1. |
| **Mát** | 1:0 |
| **Dagur** | 27.05.2022 — **Journal** 18/03714 — **Tekna** SCF |




**Tórshavnar Kommuna**

**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri Hvannasundsgøtu matr. nr. 999a, Tórshavn | | | | |
| **Undirheiti** | Kort 2. | | | | |
| **Mát** | 1:400 | | | | |
| **Dagur** | 27.05.2022 | **Journal** | 18/03714 | **Tekna** | SCF |